

# Milliardir ígjøgnum føroyska KT-skipan

## E. Pihl og Søn koyrir fyri 2 milliardir kr. av keypsfakturum ígjøgnum eina KT-skipan frá Formula

Tann 6. apríl í ár feiraðu starvsfólkini hjá Pihl og Søn 1 ára dagin, síðani tey tóku skipanina Invoice Workflow í nýtslu frá Formula.

Hetta er ein standard skipan, sum er innbygd í fíggjarskipanina Micrsoft Dynamics Nav og verður brúkt til góðkenning av fakturum, ein sokallað workflow skipan. Skipanin er ein føroysk kt-skipan, sum er ment av Formula, og sum verður nógv seld uttanlands.

Tali av starvsfólkum hjá E. Pihl og Søn sum brúka skipanina er omanfyri 700, og tey eru støðd í nógvum londum kring í heimin - t.d. í Panama, Danmark, Svøríki, Norra, Grønland og Føroyum. Árliga fara uml. 60.000 skjøl ígjøgnum skipanina, og Jan Berg deildarleiðari á Formula sigur, at gongur sum ætlað, verða tað uml. 150.000 skjøl í komandi framtíð.

Umframt at fyritøkan E. Pihl og Søn hevur keypt skipanina frá Formula, eru eisini aðrar kendar fyritøkur, ið hava keypt skipanina, td. Imerco, TV2, Telmore, Rema 1000, Saxo Bank og Bestseller, ið er tann størsta klædnafyritøkan í Danmark, og har tað starvast uml. 3.000 fólk einans í Danmark.

# Millum eggja



Góðar páskir

## Í MORGIN




Lot til gul av vestri ella útsynningi, sum út á dagin snarar í ein sunnan ella landsynning, 3-8 m/sek. Tað verður skiftandi skýggjað, men eisini nakað av sól. Hitin fer at liggja millum 6 og 9 stig. Fríggjanáttina verður andøvsgul til frískan vind av landsynningi, 5-10 m/sek. Tað verður klárt í veðrinum, og hitin fellir niður í 4 stig.

## FRÍGGJADAGIN




Hann frískar vindin upp í ein strúk av landsynningi, 8-13 m/sek. Tað verður turt og nakað av sól. Leygarnáttina verður hann landsynningur ella sunnan í ættini, og vindurin minkað nakað. Tað verður skýggjað og kanska nakað av regni. Hitin fer at liggja millum 7 og 10 stig.

## LEYGARDAGIN




Gul til frískan vind av suðri, 5-10 m/sek. Tað verður skýggjað við regni, og hitin fer at liggja millum 6 og 9 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ







## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 88 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -9 | **London** | 8 | **Keypmannah.** | -4 | **Madrid** | 15 |
| **Reykjavík** | 8 | **Tromsø** | -1 | **Helsinki** | -19 | **Róm** | 11 |
| **Tórshavn** | 7 | **Bergen** | -2 | **Moskva** | -13 | **Malorca** | 15 |
| **Lerwick** | 4 | **Oslo** | -9 | **Berlin** | -6 | **Athen** | 14 |
| **Aberdeen** | 7 | **Stokkhólm** | -6 | **Paris** | 3 | **Beijing** | 11 |

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 11. apríl | Fyrra kvarter |
| 17. apríl | Mánin næstur jørðini |
| 18. apríl | Fullmáni |

Kelda. Álmanakkin 2011

| | Suðuroyar-/ | | Vágafirði | | Skúvoyar-/ | | Skopunarfirði | | Hestfirði/ | | Sundalagnum | | Vestmanna- | | sundi | | Mykines- | | firði | | Nólsoyar- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Dagur** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** |
| 18. apr | 07:17 | 19:45 | 06:17 | 18:45 | 06:32 | 19:00 | 09:17 | 21:45 | 10:17 | 22:45 | 05:32 | 18:00 | 04:32 | 17:00 | 07:32 | 20:00 | 08:32 | 21:00 | 07:02 | 19:30 | 08:17 | 20:45 |
| 19. apr | 08:13 | 20:42 | 07:13 | 19:42 | 07:28 | 19:57 | 10:13 | 22:42 | 11:13 | 23:42 | 06:28 | 18:57 | 05:28 | 17:57 | 08:28 | 20:57 | 09:28 | 21:57 | 07:58 | 20:27 | 09:13 | 21:42 |
| 20. apr | 09:11 | 21:40 | 08:11 | 20:40 | 08:26 | 20:55 | 11:11 | 23:40 | - | 12:11 | 07:26 | 19:55 | 06:26 | 18:55 | 09:26 | 21:55 | 10:26 | 22:55 | 08:56 | 21:25 | 10:11 | 22:40 |
| 21. apr | 10:10 | 22:38 | 09:10 | 21:38 | 09:25 | 21:53 | - | 12:10 | 00:40 | 13:10 | 08:25 | 20:53 | 07:25 | 19:53 | 10:25 | 22:53 | 11:25 | 23:53 | 09:55 | 22:23 | 11:10 | 23:38 |
| 22. apr | 11:06 | 23:05 | 10:06 | 22:05 | 10:21 | 22:20 | 00:38 | 13:06 | 01:38 | 14:06 | 09:21 | 21:20 | 08:21 | 20:20 | 11:21 | 23:20 | - | 12:21 | 10:51 | 22:50 | - | 12:06 |